# H71

faldari 2

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

# H71 - KYNDIL

Leygardagin 11. oktober kl. 18.00

Hoyvíkshøllin



J&K

BÓNUS -er biligari!

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Advokatfelagið Yviri við Strond

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTARDEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03

polytan®




Tú fært avsláttur av inngjaldinum til tínar privatu tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, um tú hevur tvær ella fleiri privatar tryggingar hjá okkum. Fleiri tryggingar tú hevur, størri avsláttur fært tú.

Hevur tú inngjald til Betri pensjón á minst 10.800 krónur árliga, fært tú 20% í avsláttri av tínum privatu tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, líkamikið um tú hevur 1, 2, 3, 4 ella fleiri privatar tryggingar.

**Tilsamans kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri**

*Set teg í samband við okkum á telefon 345600 ella tf@trygging.fo og fá eitt tilboð uppá tryggingar og pensjón.*

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



# KYNDLAGONGA Í HOYVÍK

**TAÐ ER EIN KONTANT BYRJAN, IÐ OKKARA BLAÐUNGA LIÐ HEVUR Í ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGINI: FYRSTI DYSTUR VAR ÍMÓTI NEISTANUM Á HEIMAVØLLI, SUM ER EITT TAÐ MEST SAMANSPÆLDA OG SAMANSETTA LIÐIÐ Í KAPPINGINI. VIÐ BÆÐI SERA ROYNDUM OG UNGUM LEIKARUM – OG VIÐ EINI EYÐSÝNDARI BLANDING AV STÓRUM, KROPSSTERKUM MONNUM OG SKJÓTUM, LØTTUM LEIKARUM.**

Annar dystur á útivølli í Vestmanna ímóti einum av fremstu gullfavorittunum, VÍF, sum hevur eina skotmegi og ein kvikleika, ið kann snýsa mangt omanav. Eisini ein samanseting av bæði royndum leikarum og ungum stórtalentum.

Og nú er so triði dystur á heimavølli ímóti Kyndli, áðrenn vit skulu til Kollafjarðar at hitta Føroyameistararnar úr KÍF á útivølli.

Og tað er altíð heilt serstakt at taka ímóti teimum grønu kyndilsmonnunum í Hoyvík. Kyndil er søguliga saman við vestmenningum so burturúr tað mest vinnandi liðið í manshondbólti. Og Kyndil hevur myndað alla hondbóltsmenningina í Føroyum, og hevur sjálvsagt havt sera stóra ávirkan á H71. Sum ein spegilsmynd, ið tú kundi meta teg ímóti og stremba eftir at vinna. Og við venjarum og leikarum, ið hava verið ímillum feløgini. Bara sum nøkur dømi: Okkara høvuðsvenjari, Petur Mittún, var sjálvur ein av stórspælarunum hjá Kyndli í síni tíð. Og núverandi stórskjúttin hjá Kyndli, Finnur Hansson, byrjaði sína føroysku hondbóltsleið í H71, tá ið hann sum smádrongur kom til Føroya úr Íslandi saman við pápa sínum Hans Guðmyndssyni, ið var leikandi venjari hjá H71.

Mong ár gingu, áðrenn tað yvirhøvur eydnaðist H71 at vinna ein dyst á Kyndli í bestu mansdeildini. Hetta hendi í desember mánaði í

*framhald á síðu 13*



2X3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

# Avatara

## Ein heilt nýggj og serstak
## verð innan gólv

**AVATARA**

Avatara er eitt gólv við fyrimunum frá bæði tí slitsterka laminatgólvinum og tí ektaða parkettgólvinum. Nýggja avataragólvið líkist fullkomiliga einum trægólvi, hevur træstruktur og er mjúkt og heitt, júst sum træ. Samstundis er avataragólvið líka slitsterkt sum eitt laminatgólv og krevur einki viðlíkahald. Prísurin er heldur ikki at fara skeivur av: Avataragólvið er munandi bíligari enn eitt parkettgólv.

- **Júst sum træ at síggja til**
- **Strukturin kennist sum træ**
- **Heitt og mjúkt at ganga á**
- **Luktfrítt og heilsugóðkent**
- **Slitsterkt sum laminatgólv**

Prísir úr 158,- fyri m²

30 ára garanti

NÓGV YMISK & SERA VØKUR MYNSTUR



TIMBUR HT TILFAR HANDILIN


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
SENDISTOVAN
Trygg
fíggjarstýring
nema


VANILJU
KREM
Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN
MBM

SENDISTOVAN

NordikSOLO 18+

# Kom best frá byrjan við NordikSolo




Ert tú millum 18 og 28 ár, kanst tú gerast NordikSolo kundi og fáa eina rúgvu av ókeypis tænastum og serliga góðum rentum.

Vitja www.banknordik.fo/solo og gerst NordikSolo kundi.

BANKNORDIK

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F **Hjá Fróða**

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

fk

Keyp ein Toyota - og fá ein 3 ára servicepakka

**Ongar útreiðslur til viðlíkahald í 3 ár**



**REYNI SERVICE**
tel. 35 30 40 - www.reyniservice.fo

# Dekk

- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil

- sjálvandi frá Bilrøkt!



Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00

bilrokt.fo

Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo






WAAG & Co. P/f
Hoyvíksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo

www.waagbilar.fo

OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00

WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen




**Familju ískoyti** til Vodafone RED

**fyri hvørt barnið**

29,- kr./mðr.

✓ **Frí tala**
✓ **Frí sms**
í familjuni

Við Familju ískoyti til Vodafone RED kunnu tit tosa og sms'a frítt í familjuni fyri einans **kr. 29,-** fyri hvørt barnið.

So kunnu tit kenna tykkum **trygg**, at tykkara barn fær samband við tykkum, eisini, tá ið eingin talutíð er á.

Les meira um familju ískoyti á **vodafone.fo**

# Kaj Andreasen & Co

**Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum**




**TIT HAVA TØRVIN VIT ERU VEITARIN.**

Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

www.andreasen.fo

facebook.com/Kaj.Andreasen.Co

# H71

*framhald av síðu 4*

# » *Vit mugu eisini stremba eftir at vinna kappingina um bestu fjepparar í Føroyum*

1987 – tað kappingarárið, tá ið Henrik Gerster var fyrstu ferð í Føroyum sum leikandi venjari hjá H71.

Seinastu 10-15 árini hevur H71 verið skjótast vaksandi felag í Føroyum, og valdsjavnvágin millum feløgini hevur verið meiri jøvn. Ja, fleiri kappingarár hevur H71 havt sera gott tak á Kyndli. Og í flestu deildum hjá dreingjum og unglingum er beinhørð kapping millum hesi bæði feløgini. Vit kunnu eisini skoyta upp í, at hjálparvenjarin og fyrrverandi stórleikarin hjá H71, Halgir Dahl Olesen, vann sítt fyrsta steyp í bestu mansdeildini júst ímóti Kyndli í steypakappingini 1998.

Tað verður ein sera spennandi fyrsta styrkiroynd millum feløgini í ár, ið vit skulu upplíva í høllini nú.

Kyndil vann steypakappingina seinasta kappingarár við eini samanseting av nøkrum “grand-old-men” og sera góðum ungum leikarum. Hartil hevði Kyndil ein framúr málmann í Mladen og ein sera sterkan striku- og verjuleikara í íslendinginum Hørði. Hesir eru við aftur í ár, og hartil hevur Kyndil fingið onkrar egnar leikarar aftur, ið hava verið burturstaddir, og teir styrkja uttan iva liðið. Vit hoyvíkingar arga sjálvsagt kyndilsmenn við at hava eyguni eftir, um tað aftur í ár eru teir „ráu“ eldri menninir, ella teir tekniskt góðu ungu menninir,  ið fara at mynda spælið.

Okkara lið er úrval av einum sera stórum og breiðum talenthópi, og er úrslit av tí miðvísu ungdómsvenjinigni í Hoyvík. Helst eru vit tað liðið í Atlantic Airways-deildini við lægsta miðalaldri. Tveir leikarar eru í hópinum, sum vit ikki hava kent áður: Mark Lausen-Marcher, ið er settur sum ungdómsvenjari í Hoyvík. Og Jesper Pedersen, ið er vinstrahentur leikari, sum tó hevur drigist við skaða.

Tað var ein smeitur fyri liðið, at spælskiparin Jónas G. Djurhuus, var so óheppin at gerast langtíðarskaddur í venjingardysti herfyri – og vit ynskja honum góðan betring. Vit hava tó ein sera góðan og spennandi hóp. Fáa vit skjótleikan, styrkina í verjuni og spælskipanina at rigga, so verður tað ein frægd at fara til hondbólt í Hoyvíkshøllini í ár.

Men tað krevur ein veruligan stuðul frá okkum áskoðarum at lyfta upp undir sjálvsálitið hjá okkara ungu og dugnaligu leikarum. Vit mugu eisini stremba eftir at vinna kappingina um bestu fjepparar í Føroyum. Hoyvíkshøllin skal framvegis vera okkara borg, har gestirnir skulu kenna seg væl, men samstundis skulu vita, at her verður H71 lyft fram í øllum lutum.

HH







# At fara á EFTIRSKÚLA

**AT FARA Á EFTIRSKÚLA ER EIN AVGERÐ SUM EIN ER NOYDDUR TIL AT TAKA SKJÓTAST GJØRLIGT. FYRI AT SLEPPA INN Á TEIR GÓÐU EFTIRSKÚLARNIR SKALT TÚ VERA SKJÓTUR, OG ONKUSTAÐNI SKAT TÚ TIL EINA ROYNDARVENJING, ÁÐRENN TÚ SLEPPUR INN. SJÁLVUR HAVI EG VERIÐ Í VIBORG Í TVEY ÁR. FYRSTA ÁRIÐ VAR EG Á EFTIRSKÚLA, OG NÆSTA ÁRIÐ VAR TAÐ Í FYRSTA FLOKKI Í MIÐNÁMSSKÚLA. EG VALDI AT FARA Á EFTIRSKÚLA FYRI AT GERAST EIN BETUR HONDBÓLTSLEIKARI, OG HETTAR HALDI EG VAR EIN GÓÐ RAÐFESTING.**

Fyrsta árið hjá mær var tað betra árið. Eg kom niður til Danmarkar saman við tveimum vinmonnum og hetta var avbera gott. Okkara eygu vóru latin upp fyri einum professionellum umhvørvi, har vit byrjaðu intensiva styrkivenjing, morgunvenjingar og gjørdust eitt lið har allir vildu hondbóltin 100 prosent. Hettar gjørdi, at eg gjørdist meira seriøsur við venjing, tí at eg visti, at allir mentust fyri hvørja venjing og eingin vildi missa nakað.

Næsta árið var ávirkað av, at teir leikarar sum nú fóru heim aftaná eftirskúlaárið ikki vóru við til skapa tað umhvørvið, sum eg upplivdi fyrsta árið í Viborg. Hettar gjørdi, at liðið hjá mær og eg ikki kláraðu okkum væl. Eg merkti ikki á sama hátt tað seriøsa professionella umhvørvi sum eg gjørdi tað fyrsta árið.









Sjálvur gekk eg á Sports Academy Viborg sum seinastu árini er kent fyri at hava góð gentulið. Hettar er eisini ein spegilsmynd av at Viborg HK, satsar allar pengar á kvinnuliðið, og tey valdu at niðurleggja mansliðið í bestu deildini.

Nú gekk eg sjálvur á eftirskúla í Danmark, og hóast tað helst liggur mest til „høgrabeini“ at fara til Danmarkar, eru nógvir spennandi eftirskúlar aðrastaðni. Týskland hevur nógv at bjóða sum ein av førandi hondbóltstjóðunum. Ísland hevur eisini nakað at bjóða við teirra einastandandi vinnaravilja, eins og aðrar tjóðir hava stóran áhuga í hondbólti.

Hóast aðrar tjóðir hava nógv at bjóða, er Danmark lættast at leypa útí. Har eru nógvir góðir skúlar, nógv góð hondbóltslið og góðir eftirskúlar.

Eg vil heilt klárt mæla til at fara eitt ella fleiri ár á eftirskúla at menna hondbóltin og læra hondbóltsmentan úr øðrum londum at kenna.

At velja skúla kann vera ringt, men eg vil mæla til at fara ein túr hartil, sum tú ætlar, og vita, hvat tú heldur um tað. Og eg vil eisini mæla til at søkja inn fleiri støð og síðani gera av, hvat er mest innbjóðandi.

Við hondbóltskvøðu
Helgi Hildarson Hoydal

HH = Hoyvíkshøllin FH = Fimleikahøllin í Hoyvíkar Skúla SvL = Skúlin við Løgmannabreyt

| Kl | Mánadag | Týsdag | Mikudag | | Hósdag | Fríggjadag | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | HH | HH | HH | SvL | HH | HH | SvL |
| 14:00 | G10 | | D12 | | G10 | D10 | |
| 14:30 | G10 | | D12 | | G10 | D10 | |
| 15:00 | U8 | D10 | D12 | | D10 | D14 | |
| 15:30 | U8 | D10 | D12 | | D10 | D14 | |
| 16:00 | G12 | D12 | U8 | G10 | D12 | | |
| 16:30 | G12 | D12 | U8 | G10 | D12 | | |
| 17:00 | G14 | D12 | G12 | U6 | D12 | G12 | |
| 17:30 | G14 | D12 | G12 | U6 | G14 | G12 | |
| 18:00 | G14 | G14 | D14 | | G14 | | |
| 18:30 | D16/18 | G14 | D14 | | AA | | |
| 19:00 | D16/18 | G14 | D14 | | AA | D16/18 | |
| 19:30 | D16/18 | G17 | AA | | AA | D16/18 | |
| 20:00 | D14 | G17 | AA | | D16/18 | | |
| 20:30 | D14 | AA | AA | | D16/18 | | |
| 21:00 | G17 | AA | D16/18 | | G17 | | |
| 21:30 | G17 | AA | D16/18 | | G17 | | |
| 22:00 | G17 | | D16/18 | | G17 | | |
| 22:30 | | | | | | | |

| Deildir | Viðmerkingar |
|---|---|
| AA | |
| D16/18 | |
| D14 | |
| D12 | |
| D10 | |
| G17 | |

| Deildir | Viðmerkingar |
|---|---|
| G14 | |
| G12 | |
| G10 | |
| U8 | |
| U6 | |

**VENJARAYVIRLIT H71 KAPPINGARÁRIÐ 2013/2014**

| Deild | Heiti | Navn | Telefon | Teldupost |
|---|---|---|---|---|
| AA/1.deild | Høvuðsvenjari | Petur Mittún | 218284 | peturmittun@gmail.com |
| | Høvuðsvenjari | Halgir Dahl Olesen | 235940 | halgirdahlolesen@gmail.com |
| | Kroppsligur venjari | Snorri Patursson | 299528 | snorripatursson@hotmail.com |
| AA | Liðleiðari | Lars Tornefeldt | 266287 | lars_tornefeldt@hotmail.com |
| | Hjálpari | Rene Dahl Olesen | 235930 | renedahlolesen@gmail.com |
| | Málmansvenjari | Jens á Skipagøtu | 280325 | skipagota@gmail.com |
| D16/D18 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Rúni Højgaard | 261415 | runi_hoyvik@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hallur Biskupstø | 549096 | hillar_1993@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Ári Jógvansson Olesen | 595047 | Arijolsen90@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Gunnar Djurhuus | 219082 | gunnardjurhuus@gmail.com |
| D14 | Høvuðsvenjari | Jónas G. Djurhuus | 506996 | jonash71@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Djóni Gaard Joensen | 504488 | djgajol@hotmail.com |
| D12 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Karl Oddmar Rasmussen | 508338 | karlor@live.dk |
| | Hjálparvenjari | Gilli Wardum | 220505 | gilli.wardum@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Petur Mittún | 218284 | peturmittun@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Andor Sivertsen | 589401 | andor95@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hans Kári Hansen | 264826 | hanskari@hotmail.com |
| D10 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Djóni Gaard Joensen | 504488 | djgajol@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Pætur Thomsen | 509866 | paturthomsen@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Poul Símun Niclasen | 503769 | poulsimun@hotmail.com |
| G17 | Høvuðsvenjari | Petur Martin Johansen | 296260 | billutir@billutir.fo |
| | Hjálparvenjari | Tróndur Arge | 262634 | trondurarge@hotmail.com |
| G14 | Høvuðsvenjari | Jakob Jónsson | 764679 | jakob@pm.fo |
| | Hjálparvenjari | Helgi H. Hoydal | 503850 | helgihoydal@gmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hallur Danielsen | 231983 | hallur@hsf.fo |
| G12 | Høvuðsvenjari | Hendrik Egholm | 237410 | hendrik@magn.fo |
| | Hjálparvenjari | Annika Thorsvig | 217844 | annikath@torshavn.fo |
| G10 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Hallur Danielsen | 231983 | hallur@hsf.fo |
| U8 | Høvuðsvenjari | Mark Marcher | 503997 | marci604@hotmail.com |
| | Hjálparvenjari | Fróði Niclassen | 583769 | frodi-96@hhotmail.com |
| U6 | Høvuðsvenjari | Bjørg Djurhuus | 215490 | bjd2406@gmail.com |
| Ungdóms | Málmansvenjari | Ári Egason Dam | 512090 | aed@eik.fo |

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN



# Takk fyri at tú stuðlar Javna

## Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

## Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at  stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

estra VASTI


VB



polytan®

simonsen@polytan.dk
tlf. 0045 39405420
fax: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

At hann líkist øllum hinum bilunum, ella …
Spyrt tú eigaran av bilinum á myndini, dámar honum best takið og síðuspeglini. Hann kom inn á skeltiverkstaðið hjá Føroyaprent, og hokus, pokus, nakrar tímar seinni fór hann fresandi av stað aftur, við niður rullaðum vindeygum og tónleikinum drønandi frá. Sólbrillurnar sótu perfekt í mjørkanum!

**Ávaring:** Lat ikki lykilin sita í, um tú fert uttanlands við einum bili sum hesum…



Stílurin er tín, næstan alt ber til. Folia fæst í øllum litum og kann skerast út til búmerki, myndir ella tekst. Bilurin á myndini hevur carbon foliu á takinum og síðuspeglunum.

Føroyaprent
Tel. 31 45 55 www.foroyaprent.fo




MEGA
WWW.FACEBOOK.COM/MEGA.SMS
OUTFITTERS NATION




www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




# Netbankin Tablet er komin

Eik Banki P/F
Tel. 348000

www.eik.fo

**"Netbankin Tablet gevur mær frælsi og tíð til at gera tað, sum eg havi bestan hug til."**
**– Bjørk Herup Olsen, rennari**

Avgreið tíni fíggjarligu viðurskifti - uttan mun til tíð og stað. Netbankin Tablet er tann sami sum netbankin á telduni, uttan nakrar fáar funkur.

Netbankin Tablet riggar við iPad og Android teldlum, og er ókeypis at stovna og hava.



# TVØRMEGI CROSSFIT

## PERSÓNLIG VENJING Í BÓLKI

*- Ongar maskinur*

*- Einki stovningargjald*
*ella aðrar bindingar*

*- Eingir flatskíggjar*

*- Eingi spegl*

*- Einki WiFi*

## BARA VENJING!

CrossFit er venjing har vit fara burtur frá tøknini. Aftur til upprunan og nýta natúrligu rørslurnar í kroppinum. Vit standa, sita, kasta, toga, lyfta, skumpa, klintra, renna og hoppa. Allar rørslurnar gagnnýta fleiri kropsliðir og vøddar, og stimbra harvið kroppin skjótari enn venjing av einstøkum vøddum. Vit styrkna og gerast fimari. Tvørmegi er fyrsti veruligi CrossFit depilin í Føroyum.

**Venjingin í Tvørmegi er:**

- Altíð ymisk. Í longd, rørslu, endurtøkum og tyngd.
- Intens og lutfallsliga stutt. Dyggleiki hevur við sær at úrslit koma skjótt.
- Sosial og lærurík. Vit stríðast saman. Samstundis stuðla venjarar alla tíðina einstaklinginum og tryggja dyggleikan og røttu rørslurnar.

# *Tvørmegi CrossFit*

Vit húsast á
M.A Winthersgøtu 4 í Havn



Øll eru við, uttan mun til kyn, aldur og venjingarstøði.

Okkara dugnaligu venjarar undirvísa, kveikja og tillaga venjingina persónliga.

**Tvørmegi** knýtir bond millum ítróttarfeløg, og kveikir skúla- og ungdómsumhvørvi, soleiðis at vitan og førleikar mennast tvørgangandi.

**ÓKEYPIS ROYNDARTÍMI**

Tú ert hjartaliga vælkomin til ein ókeypis royndartíma tá dagsins venjing (WOD) er á skránni.

Her fært tú eina kenslu av hvat CrossFit er fyri nakað, og tú sleppir at royna venjingarnar. Fá nærri at vita á tvormegi.com.

Fá nærri at vita á tvormegi.com og facebook.com/tvormegi. Fylg okkum á instagram@tvormegicrossfit.

## PRÍSIR

| Møguleiki | Prísur | Um mánaðin | Sparing |
|---|---|---|---|
| Ein venjing | 60 kr | | |
| 10-túrakort | 500 kr | | |
| Mánaðarkort | 400 kr | | |
| 3 mánaðarkort | 1000 kr | 333 kr | 200kr fyri 3 mánaðir |
| 6 mánaðarkort | 1900 kr | 316 kr | 500kr fyri 6 mánaðir |
| Árskort | 3600 kr | 300 kr | 1200kr fyri eitt ár |



# SØLJAN

## AFTUR Í FREMSTU RØÐ

**Í NØKUR ÁR HEVUR SØLJAN ÚR SANDAVÁGI VERIÐ BURTUR ÚR HONDBÓLTSKAPPINGINI Í ODDINUM. HETTA VAR IKKI EIN STØÐA, SUM FÓLK, IÐ VARÐA AV SANDAVÁGS ÍTRÓTTARFELAG OG SØLJUNI, HAVA VERIÐ NØGD VIÐ, OG GJØRT ER TÍ AV, AT MELDA TIL AFTUR Í FREMSTU KVINNUDEILDINI. EIN AVGERÐ, SUM ER VÆL MÓTTIKIN. BÆÐI INNANFELAGS OG Í FØROYSKUM HONDBÓLTSHØPI SUM HEILD.**

Tað liggja ofta ymsar orsøkir til grund fyri teimum avgerðum ið tiknar verða. Soleiðis var eisini, tá gjørt varð av at taka fremsta liðið hjá Søljuni úr kappingini í bestu deildini. Kapasitetur var stutt sagt ikki hildin at vera í felagnum til at luttaka í deildini.

Skjótt gjørdist tó alt fleiri greitt, at hetta var ikki nøkur heppin avgerð, ið tikin var, men sum kortini tóktist tung at broyta soleiðis beinanveg.

Sum frá leið var eyðsýnt, at skuldi felagið gera seg galdandi í kvinnuhondbólti, var tað eitt einfalt krav, at hava lið í bestu deildini.



Ikki tí. Barna- og ungdómsliðini hjá bæði Søljuni og SÍF stóðu seg rímiliga væl. Men tað var púra greitt, at hesir ungu og evnaríku leikarar máttu hava eina gularót at renna eftir, um vón skuldi vera fyri at halda teimum í felagnum. Tað ber ikki til at ala úrmælingar upp í einum felag, sum onga vón gevur teimum fyri at sleppa at brúka síni evni, tá tey vaksa til. Og neyvan man nøkur felagsleiðsla kenna fylgjurnar av tí betri, enn júst leiðslan í Sandavágs Ítróttarfelag.

Arbeitt hevur tó alla tíðina verið við at finna eina berandi loysn. Og sum so ofta er, kemur hon so knappliga.

Tá felagið fyrr í ár kom í samband við venjara, sum ikki lat nakran iva vera um, at tað eigur at bera til hjá einum so siðbundnum felag sum Sandavágs Ítróttarfelag at hava eitt hondbóltslið í fremstu røð, og leikarar samstundis stóðu klárir at taka hesa avbjóðing og ábyrgd á seg, var einki at ivast í. Søljan er aftur at síggja millum nøvnini á teimum feløgum, sum spæla hondbólt í bestu deildini.

Hóast fólk eru jarðbundin, og hvørki leikarar ella leiðsla beinleiðis ganga og fyrigykla sær nakað meistaraheiti soleiðis beinanveg, er farið við góðum treysti undir fyrireikingarnar til kappingina.

Og vit onnur. Ja, vit kunnu bert gleðast um, at Søljan aftur sprettur.

Vit heilsa Søljuni vælkomnari aftur í fremstu røð í føroyskum kvinnuhondbólti.

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO



Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700




Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

# h71 klæðini 2014/15



H71 INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur
adidas®


Vælkomin inn á gólvið hjá okkum ... her finnur tú altíð okkurt!
pf Skálabúðin
DR. JACOBSENSGØTA · TEL. 315 315
FØROYAPRENT 314555


Matstovur keypa gass og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909


SKORA VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

FAROE SHIP

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

## Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahaldsútreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

**Auto Service**
www.autoservice.fo

BYGMA
BALSLEV

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com




SENDISTOVAN

amr.fo_

# TEY SVØRTU TØLINI

## DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

| Dato | Heimalið | Útilið | Úrslit |
|---|---|---|---|
| 28.09.2014 | H71 | Neistin | 24-27 |
| 08.10.2014 | VÍF | H71 | |
| 11.10.2014 | H71 | Kyndil | |
| 19.10.2014 | KÍF | H71 | |
| 25.10.2014 | H71 | Team Klaksvík | |
| 02.11.2014 | StÍF | H71 | |
| 06.11.2014 | Neistin | H71 | |
| 16.11.2014 | H71 | VÍF | |
| 19.11.2014 | Kyndil | H71 | |
| 30.11.2014 | H71 | KÍF | |
| 05.12.2014 | Team Klaksvík | H71 | |
| 13.12.2014 | H71 | StÍF | |
| 20.12.2014 | H71 | Neistin | |
| 01.02.2015 | VÍF | H71 | |
| 15.02.2015 | H71 | Kyndil | |
| 18.02.2015 | KÍF | H71 | |
| 25.02.2015 | H71 | Team Klaksvík | |
| 28.02.2015 | Team Klaksvík | VÍF | |
| 01.03.2015 | StÍF | H71 | |
| 01.03.2015 | KÍF | Kyndil | |
| 07.03.2015 | Team Klaksvík | Kyndil | |
| 08.03.2015 | StÍF | VÍF | |
| 08.03.2015 | Neistin | H71 | |
| 18.03.2015 | H71 | VÍF | |
| 22.03.2015 | Kyndil | H71 | |
| 29.03.2015 | H71 | KÍF | |
| 01.04.2015 | Team Klaksvík | H71 | |
| 04.04.2015 | H71 | StÍF | |

## STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

| Nr. | Lið | Dystir | V.m | T.m. | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 2 | 62 | 39 | 23 | 4 |
| 2 | VÍF | 2 | 52 | 37 | 15 | 2 |
| 3 | KÍF | 1 | 32 | 30 | 2 | 2 |
| 4 | StÍF | 2 | 42 | 50 | -8 | 2 |
| 5 | Neistin | 2 | 43 | 56 | -13 | 2 |
| 6 | H71 | 1 | 24 | 27 | -3 | 0 |
| 7 | T. Klaksvík | 2 | 48 | 64 | -16 | 0 |

# LIÐINI HESUFERÐ

## H71

**Málmenn:**

1 Ári E. Dam
12 Hanus Kristiansen

**Útileikarar:**

2 Djóni V. Højgaard
3 Mark Lausen-Marcher
4 Rúni V. Højgaard
5 Bogi G. Davidsen
6 Tróndur Arge
7 Eindri T. Frýdal
8 Pætur Thomsen
9 Andor í Horni Sivertsen
10 Hallur Biskopstø
11 Hans Kári Hansen
14 Sigmundur Dahl
15 Sigmundur Nolsø
17 Oddur Bech
22 Helgi Hoydal

*Venjarar* **Halgir Dahl Olesen**
**Petur Mittún**
*Málmansvenjari* **Jens á Skipagøtu**
*Liðleiðarar* **Lars Tornefeldt**
**Rene Dahl Olesen**

## Kyndil

**Málverjar**

1 Jan Pauli Johannesen
12 Mladen Mjerimacka
16 Tórður Guttesen

**Útileikarar**

3 Hans Arni Thomsen
5 Andrias Sólsker
6 Hjalti Bachman
7 Josef Abrahamsen
8 Julian Johansen
9 Birgir Poulsen
10 Høgni Klein Olsen
11 David Edvardsen
20 Finnur Hansson
22 Rune Olsen
26 Bjarni Sørensen
32 Hørður F. Sigthórsson
55 Frank Askildsen

*Venjari* **Hjalmar Klein Olsen**
*Venjari* **Geir Wardum**
*Hjálpari* **Dávur Clementsen**
*Liðleiðari* **Leif Kristoffersen**


**Ítróttarfelagið Hoyvík H71**
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

**NEVND**
Sunneva Jakobsen, forkvinna
231115, sunneva@liv.fo

Gunn Ellefsen, næstforkvinna
593040, ge@lawfirm.fo

Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

Anna Dam, 519082
ad@lawfirm.fo

Rene Dahl Olesen, 235930
renedahlolesen@gmail.com

Emy Sólvitsdóttir, 513769
emys@olivant.fo

Bergtóra Høgnadóttir, 286011
bergtorajoensen@gmail.com

Janet Fríða Johannesen, 212211
jjoh@olivant.fo

**ÁBYRGD AV FALDARA**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**ÁBYRGD AV HEIMASÍÐU**
Agga Niclasen, 508689
h71faldarin@gmail.com

**SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

**MYNDIR**
Jan Egil Kristiansen, 26 22 40

**ÚTGEVARI**
H71

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR
JULIANNA KLETT · JOHAN J. LAMHAUGE